## Læraratrot í Grønlandi

Ein uppgerð hjá grønlendska lærarafelagnum vísir, at hetta skúlaárið arbeiða 903 fólk við læraraútbúgving sum lærarar í grønlendska fólkaskúlanum. Tað eru 67 fleiri enn seinasta skúlaár. Kortini eru framvegis umleið 300 fólk við aðrari útbúgving enn læraraútbúgving, sum arbeiða sum lærarar. Kunuunnguaq Fleicher í lærarafelagnum sigur við KNR, at hóast tørvurin framvegis er stórur, so er tað jaligt at síggja, at tað gongur rætta vegin.



## Grønlandsbankin gott úrslit

Eftir grønlendskum viðurskiftum roysdist árið í fjør Grønlandsbankanum óvanliga væl. Roknskapurin, sum varð almannakunngjørdur fyrradagin, vísir, at bankin hevði 112,6 mió. krónur í avlopi fyri skatt, og tað var átta prosent meiri enn í 2006. Bankin sigur, at tað góða úrslitið kemst fyrst og fremst av nýggjum lánum og størri handli við virðisbrøvum. Leiðslan væntar sama úrslit í ár og mælir til at luta eigarunum 108 mió. krónur í vinningsbýti.

# Norðborg verður nú sjósett og navngivin

*Nýggja Norðborg hevur fingið skap, og mikukvøldið verður skipið sjósett og navngivið í Chili*

*Mynd: Bogi Rasmussen*



**Sunnudagin fara eini 36 fólk úr Føroyum yvir til Chili, har nýggja og stásiliga verksmiðjuskipið, sum Kristian Martin Rasmussen og synir hansara lata smíða, verður sjósett og navngivið**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tey, sum eru í ferðalagnum úr Føroyum til Chili, eru í fyrsta lagi eigarar, familja, løgfrøðilig ráðgeving og fíggingarstovnar. Einki alment umboð verður við á ferðini.

Bjørn Kalsø, fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, varð upprunaliga boðin við. Hann játtaði og ætlaði sær eisini við, men nú hann ikki er landsstýrismaður longur, verður hann ikki við á ferðini.

Núverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, Torbjørn Jacobsen, er nýggjur í sínum starvi og hevur sum so einki havt við hesa verkætlan at gera.

Tískil er einki alment umboð við á ferðini.

### Nýggj Norðborg

At skipið nú verður flotað og navngivið, merkir kortini ikki, at tað er liðugt og klárt til levering. Sambært sáttmálanum verður nýbygningurin latin eigarunum til heystar.

Bogi Rasmussen, sonur reiðaran Kristian Martin Rasmussen, sigur, at chilenar skipa fyri hátíðarhaldi, tá skip verður sjósett og navngivið, men tá ið skipið seinni verður latið eigarunum, verður einki hóvasták gjørt burtur úr.

- So, tað er nú, at hátíðarhaldið verður, og tað er tí, at vit fara so mannsterk yvir, sigur hann.



*Gamla Norðborg, sum slóðaði fyri, verður seld, tá ið nýggja skipið kemur í flotan til heystar*

*Mynd: Bogi Rasmussen*

Tann stóri dagurin hjá familjuni Rasmussen í Klaksvík verður komandi mikukvøld, 20. februar. Tá verður nýbygningurin navngivin, og tá verður eisini skipað fyri hátíðarhaldi og borðhaldi.

Bogi Rasmussen dylir ikki, at navnið á nýggja skipinum verður Norðborg, sum kemur at loysa gomlu Norðborg av. Verandi skip, sum saman við reiðarií og manning, hevur slóðað fyri á framleiðsluøkinum, er ikki so gamalt kortini. Tað er frá 1990.

- Norðborg er eitt rímiliga gott skip, men hevur ikki somu møguleikar, sum eitt nýtt og nútímans skip hevur. Maskin-og framleiðsluorka eru ov lítil, og møguleikarnir at fáa alla rávøruna til sættis, eru ikki teir somu, sum við nýggja skipinum, sigur hann.

Felagið roynir nú at selja gomlu Norðborg, sum fer úr føroyska fiskiskipaflotanum, tá ið nýbygningurin kemur í flotan.

### Alt til virkingar

Bogi Rasmussen sigur, at nýggja skipið verður 83,50 metrar langt og 18,40 metrar breitt. Tað fer at lasta 1400 tons av frystari vøru á plattum, tangarnir taka 1250 rúmmetrar av rávøru, og skipið lastar 400 tons av mjøli.

- Vit fara at skera og frysta flak, og vit fara at heilfrysta til matna. Haraftrat fara vit at framleiða møl og lýsi.

Tann parturin av rávøruni, sum fer til mjøl og lýsi, er tað, sum fellir frá framleiðsluni, eins og fiskur, sum ikki er hin besti til matframleiðslu.

Í prinsippinum kemur nýggja Norðborg at virka allan ráfiskin umborð – og tí verður einki til eitt nú Havsbrún í Fuglafirði ella onnur ídnaðarvirki.

- Tað er sjálvandi torført at siga, um nýggja skipið ongantíð – og einki - fer at landa til ídnað, men konseptið byggir á, at alt verður virkað umborð, sigur Bogi.

### Størri framleiðsla

Vónirnar um, at nýggja Norðborg fer at fáa tað at hanga saman fíggjarliga, eru góðar, og høvuðsorsøkin er sjálvsagt, at menninir aftanfyri verkætlanina vita, hvat tað er, teir eru farnir undir.

- Eingin kennir framtíðina til fulnar, men vit hava góðar vónir um, at hetta fer at bera til, sigur Bogi.

Manningartalið við nýggja skipinum verður umleið hitt sama, sum við gomlu Norðborg.

- Ætlandi verða 24 mans við skipinum, og tað er sama tal, sum við verandi skipi.

Hann sigur, at framleiðsluorkan hjá nýggja skipinum verður út við eina helvt størri enn við tí gamla, samstundis sum prísgongdin á frystum flaki úr svartkjafti og heilfrystum er positiv.

- Hetta merkir, at vit við umleið somu manning kunnu virka nógv meira við nýggja skipinum enn við tí gamla. Haraftrat kemur so, at nýggja skipið hevur mjølverksmiðju, sigur Bogi Rasmussen.

# Frystigoymslan fírskar umhvørvið í Ánunum



*Nýggja goymslan tekur seg væl út í Ánunum, og tað er ikki sørt, at hon fírskar økið upp*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Seinni í vár verður frystigoymslan í Ánunum tikin í nýtslu**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggja frystigoymslan, sum felagið aftanfyri Christian í Grótinum og Norðborg byggir saman við Kjølbro og Faroe Ship, stendur nú at síggja til liðug í Ánunum.

Men liðug er hon ikki kortini, ikki heilt.

Bogi Rasmussen sigur, at ytri parturin á sjálvari goymsluni er liðugur, men enn er væl eftir at gera innandura.

- Hampast skal eisini um økið rundan um goymsluna, so tað verður arbeiðssligari og sær nossligari út, og síðan verður goymslan ætlandi klár at taka í nýtslu til várs.

Hann sigur, at tað verður Faroe Ship, sum kemur at standa fyri sjálvum rakstrinum av frystigoymsluni, sum annars kemur at geva feløgunum nógv betri møguleikar við uppskiping og goymslu.

- Hetta er ein neyðug íløga, sum fer at gera umstøðurnar – bæði hjá okkum og øðrum - nógv betri, sigur Bogi Rasmussen.